Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Erhard Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum

Evni: Dialysuviðgerð á Suðuroyar Sjúkrahúsi

Spurningar:

1. Hví er ætlaða dialysuviðgerðin á Suðuroyar Sjúkrahúsi ikki enn sett í verk?
2. Nær ítøkiliga verður skipanin/ dialysuviðgerðin sett í verk?
3. Hvørjar eru orsakirnar til, at skipanin enn ikki er sett í verk?

Viðmerkingar:
Løgtingið hevur í fleiri umførum játtað pening til dialysuviðgerð á Suðuroyar Sjúkrahúsi, bæði í 2022, 2023 og 2024 - alt við tí endamáli at fyrireika og seta í verk skipanina.

Gjørdir eru nýggir fasilitetir og íløgur í bestu útgerðina til dialysuviðgerð - útgerð í serklassa.

Harafturat kann upplýsast, at 3 sjúkrarøktarfrøðingar hava fingið upplæring í at brúka tólini og kunna fremja viðgerðina - tær gjørdust lidnar við upplæringina hálvan desember 2023. Hóast hetta er dialysuviðgerðin enn ikki byrjað.

Tað er heilt greitt Løgtingsins vilji, at skipanin skal setast í verk á Suðuroyar Sjúkrahúsi, og tí er tað sera óheppið, at tað dregur út at seta hana í verk. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 8. februar 2024

Erhard Joensen